**Ár 2019, hin 21. feb. kl. 15:00 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Andras Róin, Sigmar Jacobsen og Marjun W. Thomassen.
**Ikki møtt:** Gunvá við Keldu.

**33.**
**Avhending av veghæddini og íbúðunum - Biskupstorg**

KráarN15-02-2019:
Vísandi til løgfrøðiligt notat frá Jógvani Páll Lassen, advokati, dagfest 19. februar 2019, og notati við fíggjarligum útgreiningum frá Andrasi Róin, stjóra á Bústøðum, og Tummasi T. Eliasen, kommunustjóra, dagfest 20. februar 2019, samtykkir nevndin:
* [redacted] eftir at hædd er tikin fyri innskotspartinum hjá kommununi í sjálvsognarstovninum
* [redacted] tir at hædd er tikin fyri innskotspartinum hjá Bústøðum í sjálvsognarstovninum.

**Fundurin lokin kl. 15:45**

**Ár 2019, hin 15. feb. kl. 9:30 varð fundur hildin í Kráarbrekkunevndini, har hesir limir møttu:** Jógvan Skorheim, Beinta Klakstein, Gunvá við Keldu, Andras Róin, Sigmar Jacobsen og Marjun W. Thomassen.
**Onnur:** John Færø, trivnaðarstjóri (skrivari), Tummas T. Eliasen, kommunustjóri, Óla Jákup Bech, tekniskur stjóri, og Maria Thorsteinsson, journalleiðari.

**29.**
**Áseting av fundardøgum fyri árið 2019**
Í viðtøkunum fyri sjálvsognarstovnin, § 8, stk. 2, um nevndarfundir, er ásett, at "nevndarfundir verða hildnir minst eina ferð um fjórðingsárið". Víðari er ásett í § 12, stk. 1, um ársaðalfundir, at "í seinasta lagi innan 3 mánaðir eftir lokið roknskaparár verður ársaðalfundur hildin".

Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt nevndini til at hava hesar regluligu fundi í 2019:

- Fríggjadagur 15. februar 2019 kl. 09:30 (hesin fundurin)
- Hósdagur 21. mars 2019 kl. 09:30 (ársaðalfundur)
- Hósdagur 20. juni 2019 kl. 09:30
- Hósdagin 7. november 2019 kl. 09:30

KráarN 15-02-2019:
Samtykt at taka undir við uppskotinum til fundardagar.

Annars viðmerkir Gunvá við Keldu, at ynski er um at hava fleiri fundir.

**30.**
**Status fyri arbeiðið í Miðbýnum kring Biskupstorg – Óla Jákup Bech, tekniskur stjóri**
Óla Jákup Bech, tekniskur stjóri, greiddi frá liðugtgerð av økinum uttan fyri bygningin, vísandi til tekning, víst fram á fundinum. Umrødd vóru millum annað krøv til parkeringspláss og skoytubreyt.

KráarN 15-02-2019:
Málið verið til kunning.

**31.**
**Status fyri veghæddina – Tummas T. Eliasen, kommunustjóri**

KráarN15-02-2019:
Jógvan Skorheim, nevndarformaður, greiddi frá einum uppleggi, sum arbeitt verður við saman við leiðsluni fyri Bústaðir, har lagt verður upp til, at Bústaðir yvirtaka ognarskapin av íbúðapartinum á Biskupstorg, meðan Klaksvíkar kommuna yvirtekur ognarskapin av veghæddini, samstundis sum stovnsfæið í sjálvsognarstovninum verður lækkað.
Andras Róin, næstformaður, greiddi frá, at stýrið fyri Bústaðir tekur undir við hesum leisti, soleiðis at ognin og skuldin í sambandi við íbúðirnar ikki verður staðsett í einum sjálvsognarstovni, men verður ogn hjá Bústaðir.
Formaðurin legði upp til, at nevndin hevur ein fund afturat mikudagin í komandi viku (20. februar klokkan 15:00 í býráðshøllini), har uppleggið um hesa ætlaðu umskipan verður viðgjørt av nevndini.
Tilfarið í sambandi við hetta verður sent nevndarlimunum mánadagin áðrenn fundin.

**32.**
**Víðari tilgongdin viðv. útleigan av íbúðunum, áseting av leiguprísum v.m. – Andras Róin, stjóri á Bústøðum**

KráarN15-02-2019:
Andras Róin, næstformaður, greiddi frá gongdini í arbeiðnum við íbúðapartinum á Biskupstorg. Avhending frá Byggifelagnum Kanjon kann fara fram í komandi viku, og arbeiðið við innflyting kann byrjast, soleiðis at innflytingar kunnu fara fram 1. apríl til 1. mai 2019.

**Fundurin lokin kl. 11:15**